# VIÐMERKINGAR

# Ein óvirðilig avgerð ímóti starvsfólkunum á Strandferðsluni

ANNFINN BREKKSTEIN

Eg trúði ikki, at sovorðið kundi henda í 2007, har alt tos snýr seg um visjónir og framburð. At skrykkja tilverugrundalagið undir 20 starvsfólkum á Strandferðsluni og familjum teirra, bara tí tey búgva í Tórshavn, er langt úti. Hetta, bara tí landsstýrismaðurin og Fólkaflokkurin saman við samgonguni hava fingið politiskt forstoppilsi og vilja hervið tryggja samgonguni nakrar atkvøður til komandi val.

Hví velur Jacob Vestergaard at gera hetta júst nú, beint eftir at hann er drigin ígjøgnum manesjuna við starvsfólkum á Matrikkulstovuni? Tey blivu eisini viðgjørd á ein sera ófantaligan og ikki minst óprofessinoellan hátt, har landsstýrismaðurin royndi at skáka sær undan ábyrgdini við at siga, at tað er stjórin á Matrikkulstovuni, ið setir og loysir fólk úr starvi. Mín spurningur til landsstýrismannin vildi verið, hvør setir og loysir stjóran á Matrikkulstovuni úr starvi?

Tað vísir seg at hetta landstýrið slett ikki virðir ávísar fakbólkar, nevnliga limirnir hjá Starvsmannafelagnum, sum ferð eftir ferð verða rendir yvir enda av landsstýrinum. Tað verður lovað teimum, at tey skulu verða tikin við, tá bygnaðarbroytingum fara fram á almennum stovnum – men bara ikki í Tórshavn!

Hetta kann prógvast, tí hvørki leiðslurnar á almennum stovnum ella avvarðandi landsstýrismenn virða hetta nakað sum helst, tá talan er um starvsfólk, sum búgva í miðstaðarøkinum, tey verða rætt og slatt ikki vird og viðfarin har eftir. Ótryggleikin valdar nú um dagarnar á almennum arbeiðsplássum í miðstaðarøkinum, nú politikararnir (les: samgongan) gera kollektivar samtyktir og skrykkja livibreyðið og tilverugrundalagið undan hesum starvsfólkum og familjum teirra.

Strandferðslan hevur ment seg frá degi til dags hesu síðstu árini. Við ungum og dugnaligum stjórum, saman við góðum og trúføstum starvsfólkum, er tað eydnast at hækka tænastustigið og menna stovnin munandi. Hetta er so takkarlønin, tey fáa afturfyri at hava arbeitt hjá einum almennun stovni, sum liggur í miðstaðarøkinum.

Um rætt var atborið, skuldi samgongan havt boðað frá, at frá 2012 skal umsitingin hjá Strandferðsluni suður til Tvøroyrar, og landsstýrismaðurin skuldi sjálvsagt tillagað stovnin og starvsfólkini til ta broytingina. Við hesum hevði landsstýrismaðurin víst virðing fyri starvsfólkinum og stovninum. Hesin mátin, ið nú verður brúktur, minnir ikki sørt um primitivar revolvaraloysnir.

Fólkaflokkurin hevur sett Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin í skák og mát í samgonguni, tí nú hevur Fólkaflokkurin sett alt inn fyri at skora atkvøður til flokkin, meðan summir flokkar blíva við at gera politisk mistøk í ríkiligt mát. Ofrini fyri hesum spælinum eru Strandferðslan og tey, sum har starvast, og tað kann bara átalast, tí soleiðis ber snøgt sagt ikki til at fara við fólki!

# Borgarstjórin í Havn viðmælir at flyta arbeiðspláss úr høvuðsstaðnum



SJÚRÐUR OLSEN
Býráðslimur, Tórshavn

Trúði, at eg sá yvir meg, tá eg las á Portalinum, at borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, tók undir við hesum máli. Eitt er, vit ongan góðan eiga í løgtinginum fyri Suðurstreym, men tá borgarstjórin í Havn blandar seg í tann bólkin, haldi eg, at fólk áttu at tala at.

Kanska flyta øll almenn arbeiðspláss úr Havnini, og øll onnur flyta í mentarnarlig pakkhús.

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, heldur, at betri livilíkindi eru á Tvøroyri heldur enn her og nevnir barnansing og skúla. Hann átti at komið til Havnar at kunna seg meira, tí Havnin er eitt ljósár framman fyri Tvøroyri á øllum økjum. Borgarin krevur meira í dag enn bara eitt arbeiðspláss. At tit ikki klára at semjast um at leggja oynna saman í eina kommunu og harvið fáa betri møguleikar á øllum økjum, haldi eg sigur nokk um tykkum har suðuri.

Annars haldi, eg landsstýrismaðurin Jacob Vestergaard er langt úti í hesum máli. Haldi, at man átti at kravt mannin frá beinanvegin.

Tíðin er kanska komin at stovna ein Havnarflokk á tingi, bara við einum endamáli:

At verja áhugamál í Suðurstreymi.

## Pedagogfelagið havt aðalfund

Eftir aðalfundin hin 24 februar 2007 hevur nevndin í Føroya Pedagogfelag, í dag 28. februar, skipað seg av nýggjum soleiðis:

Jarvin F. Hansen, valdur formaður
Maud Wang. Hansen, næstformaður
Jógvan Philbrow, skrivari
Sigga Óladóttir. Joensen, kassameistari
Anja Egholm, nevndarlimur

Tiltakslimir eru:
Karl Martin Samuelsen
Jórun Ennistíg
Joan Heinesen

Nýggja nevndin fer nú til verka at fyrireika seg til m.a. 25 ára hald felagsins 1. juni og komandi sáttmálasamráðingar.

**Føroya Pedagogfelag**

Spurningur til Karstin Hansen

# - núverandi tingmann fyri Miðflokkin, valdur inn á ting fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum

JÓGVAN RAVNSFJALL, KLAKSV.

Nú fleiri tingfólk ganga so høgt uppí at taka støðu fyri ella ímoti etiskum spurningum, har tey vísa til teirra sannføring til hesar etisku spurningarnar, og tí mugu handla eftir síni innastu sannføring, vil eg seta Karstini Hansen tingmanni ein einfaldan spurning um etikk.

Her síggja vit burtur frá stýrisskipanarlógini, og hugsa bert um tann etiska spurningin.

*Er tað etiskt rætt, at ein persónur, valdur inn á ting við 1/3 av atkvøðunum fyri ein flokk í einum valdømi, kann halda fram í tinginum umboðandi hetta valdømi, tá hann í tingtíðini er farin úr flokkinum í annan flokk, og tileinkisgjørt hinar 2/3 av atkvøðunum til flokkin, sum vórðu ein fortreyt fyri at hann kom inn á ting.*

Til hetta kann bert svarast ja ella nei.

1. Um svarið er ja, so vita vit hvørja hugsan Kartin Hansen, og harvið miðflokkurin hevur til ein slíkan etiskan spurning.

2. Um svarið er nei, so letur Karstin Hansen tingsessin frá sær til næsta mann á listanum, tí hetta er tað sum er hent, við tað at hann hevur skift flokk á tingi; og Karstin sigur, at hann altíð fer at handla eftir síni etisku sannføring.

3. Um Karstin Hansen ikki svarar spurninginum, so vil hann sum tingmaður ikki yvirfyri almenninginum siga hvørja støðu hann hevur til henda etiska spurningin.

Svarið kann tá bert leiðast útfrá, um Karstin Hansen verður sitandi sum tingmaður skeiðið út ella ikki.

Karstin Hansen er vælkomin at svara aftur í teimum fjølmiðlum, har spurningurin er settur.

Fundur í Krabbameinsfelagið

# Kom á tal við Almannastovuna

Føroya Felag móti Krabbameini skipar fyri almennum fundi týskvøldið 14. mars 2007 kl. 19 í hølunum hjá felagnum á Grønlandsvegi 58, Tórshavn.

Á fundinum fara Eyðvør Mortensen og Maria Jacobsen, frá Almannastovuni, at greiða frá, hvussu mannagongdin er, tá ið tú sendir Almannastovuni umsókn og til tú fært svar haðani.

Tú fært at vita, hvørjar leiðreglurmálsviðgerðarnir hava at ganga eftir; tú kanst eisini fáa svar upp á ítøkiligar spurningar, men á hesum fundinum fara málsviðgerðarnir ikki í einstøk ítøkilig mál og kunnu tí ikki svara persónligum spurningum.

Tú fært høvi at seta spurningar á fundinum, men tú ert eisini vælkomin at skriva ella ringja spurningar inn fyri fundin.

Gert tú tað, kanst tú verða vís ella vísur í, at tíni ivamál ella trupulleikar verða lýstir og tínir spurningar svaraðir.

Orðstýrari verður sosialráðgevin hjá felagnum, Karen Heinsen, sum eisini kann svara tínum ivaspurningum áðrenn fundin.

Øll eru vælkomin!

Sosialurin i Sosialurin